## Svimja til Nólsoyar

Ovastevnan verður ikki fyrr enn um eina viku, men longu nú leygardagin verður farið undir árliga svimjitúrin til Nólsoyar. Hetta tí streymurin er rættiliga harður, tá ovastevnan sjálv stendur á skránni.

Byrjað veðrur klokkan 13 yvir við Strond við Stóradamm, og so skulu teir fýra kilometrarnir út til Nólsoyar svimjast. Málið er við Heiðursportrið, og koma svimjararnir á land aðrastaðni á oynni, skulu hesir renna yvir til málið.

Kravt verður av svimjarunum, at hesi skulu vera í b´únum, sum hóska seg til avbjóðingina, eins og bátar við neyðugu trygdarútgerðini skulu fylgja hvørjum einstøkum svimjara.

**-mørk**

## Rendi á reinsdjór

Champ Car koyrarin Christiano Da Matta varð í gjár fluttur á sjúkrahús, har hann var lagdur undir skurð fyri eina bløðing í heilanum. Hetta hendi eftir at Da Matta við nógvari ferð rendi á eitt reinsdjór, ið var sloppið inn á Road America breytina, har Champ Car bilarnir royndarkoyra hesa vikuna.

28 ára gamli brasiliumaðurin Da Matta varð fluttur við tyrlu á sjúkrahús, og beinanvegin lagdur undir skurð, sigur CNN í dag. Enn hevur RuSport liðið, har Da Matta koyrir, ikki sagt nakað um, hvussu støðan hjá Da Matta er eftir skurðviðgerðina.

**-nud**

# Hagtølini hava ein góðan vin

**Marni Mortensen er saman við øðrum farin í holt við at gera ein veruligan databasa yvir føroyskan fótbólt. Í fyrstu atløgu fyri bestu mansdeildina, men sum frálíður skulu allir dystir í føroyskum vaksnamannafótbólti vera partur av skipanini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



Tey flestu við kunnleika til føroyskan fótbólt munnu kenna Marna sum ídnasta og drúgvasta heimasíðuvertin í føroyskum fótbólti. Hóast aðrar føroyskar fótbóltssíður hava gjørt upp til fleiri upplop, so er tað neyvan nøkur teirra, sum eins støðugt hevur verið dagførd, sum tann hjá HB hevur verið tað.

Ein týðandi partur av hesi hevur altíð verið neyvu hagtølini, sum eru at finna á síðuni. Ikki minst søguligi parturin av hesum, og hóast hann ikki vil rópast hagtalsfreak, so sigur Marni, at hetta leingi hevur havt hansara áhuga. Og ætlanin at gera eitt veruligt yvir føroyskan fótbólt, er eisini nakað, sum hevur búnast leingi.

– Tað byrjaði nokk, tá eg fyrstu ferð spældi í fyrstu deild – í 1985. Eg hevði lagt merkis til, at einki bleiv skrásett í føroyskum fótbólti, og tá líka sum byrjaði tað. Seinni havi eg so verið partur av arbeiðinum at gera tvær bøkur um HB, og tá sá eg eisini, hvussu ótrúliga stór mangulvøra hetta er í føroyskum fótbólti. Tað var annars nakað, sum eg – og helst fleiri við mær – tóku sum eina sjálvfylgju varð skrásett hjá FSF, men tað er tað bara ikki. Og feløgini sjálv eru somikið lítil, at tey hava ikki orku til hetta.

### Bøkurnar skundaðu undir

Hóast tað til tíðir hevur verið enntá sera møtumikið, so hevur arbeiðið við júst teimum báðum bókunum á sín hátt eisini verið við til at skunda undir ætlanirnar at fara í holt við eina somikið stóra verkætlan, sum hesa.

– Tað hevur í øllum førum givið mær nakrar royndir, soleiðis at eg í dag eri munandi betri førur fyri at finna fram til røttu keldurnar. Eg veit, hvat eg kann finna hjá FSF, hvat er at síggja á landsbókasavninum og hvat kanska er á landsskjalasavninum ella gerðabókum hjá feløgum og privatpersónum. Og kanska veit eg eisini, hvat er vónleyst at finna, soleiðis at ikki alt ov nógvar kreftir verða nýttar til onga nyttu.

– Samstundis hevur ætlanin á sín hátt eisini bíða eftir teimum røttu samstarvsfeløgunum. Sjálvur eri eg avgjørt ikki nakar KT-snillingur, og tí var umráðandi, at eg hevði ein ella fleiri makkarar, sum vóru stinnir á hesum økinum. Og samstundis skuldu hesir vera menn, sum eg visti áhaldandi vildu arbeiða við hesum. Altso ikki nakrir, sum bara byrjaðu, og so mistu áhugan, tá ein mánaður ella tveir vóru lidnir. Og teir báðar menninar haldi eg meg hava funnið í Eyðun Lamhauge og Bjarna Joensen.

### Vil finna sum mest

Hóast ambitiónsstøðið í ætlanini er at gera eitt yvirlit, sum gongur aftur til fyrstu landskappingina – í 1942 – so er Marni tó skjótur at ásanna, at tað mes sum við vissu er púrasta ógjørligt at gera eitt fullfíggjað hagtalsyvirlit somikið langt aftur.

– Tað er nú einaferð so, at tað besta amboðið, um slíkar skrásetingar skulu gerast, er sjálvur dómaraseðilin. Men í fleiri førum – sjálvt innan seinastu árini – er dómaraseðilin als ikki til. Men tekru tú fremstu deildina, so sleppur tú helst nøkun lunda snikkaleysur aftur til 1991 ella so. Og tá hugsi eg altso um skrásetingar av øllum. Spælarum, málskjúttum, gulum og reyðum kortum, útskiftingunum v.m. Men fert tú longur aftur enn 1991, so er dómaraseðilin snøgt sagt ov vánaligur. Eisini hóast FSF eigur teir flestu seðlarnar aftur til 1978, so innihalda hesir langt ífrá allar upplýsingar.

– Og skalt tú longur aftur, so er tað, at vit tosa um landsskjalasavn, tíðindabløð og annað, men tá er trupult at fáa nakað fullfíggjað yvirlit. Úrslitini ber hinvegin til at fáa fatur á, og verða hesi skrásett, so eru allir dystirnir so í skipanini. Og vónandi ber til at gera eina skipan, har øll faktuel vitan innan føroyskan fótbólt er skrásett. Og ikki minst eisini vitanin um, hvat ikki bar til at leita fram.

### Ónøktandi skipan

Hóast tað í dag er munandi lættari at leita sær upplýsingar, enn tað var fyri nøkrum áratíggjum síðani, so er Marni tó langt ífrá nøgdur um tær skrásetingar, sum í dag verða gjørdar. Ein hálvgum frustratión, sum hann helst hevur til felags við flestu føroysku ítróttarskrivarar.

– At vit yvir høvur hava somikið fræga skráseting í dag, kemst helst eisini av, at eitt nú eg – men sjálvandi eisni fleiri onnur – hava roynt at greitt frá hesum. Og tað hevur nokk eisini gjørt sítt, at Føroyar eru komnar upp í altjóða fótbólt.

– Men sjálvt í dag eru skrásetingarnar langt ífrá nøktandi. Sjálvt til ein dyst í Formula-deildini – fremstu føroysku deildini – verður ikki eingongd skrásett, um eitt mál er brotsspark, hvør hevur gjørt sjálvmál, hvar ella hvat klokkan dysturin er spældur og so framvegis. Funktiónin hjá leiðarum á beinkinum er heldur ikki skrásett, og sum heilt tykist tað ov tilvildarligt. Tað

## FAKTA UM ÆTLANINA

Endamálið er at gera eina heimasíðu, sum snýr seg um føroysk fótbóltshagtøl burturav. Herundir eisini upplýsingar um feløg, vøllir v.m., sum ikki beinleiðis verða bólkað undir hagtøl. Á síðuni skal verða gjørligt at spyrja um stórt sæð alt: Úrslit og støður, spælarar, málskjúttar, dystar- og máltal fyri einstøku spælararnar, dómara- og venjarahagtøl o.s.fr. Snøgt sagt ein føroysk fótbóltsalfrøði um alt tað, sum fyriferst innan føroyskan felags- og landsliðsfótbólt.

Allir tøkir dómaraseðlar skulu lesast inn, heilt frá fyrstu landskappingini í 1942. Í fyrstu atløgu er endamálið at skráseta bestu mansdeildini, næst bestu mansdeildina, steypakappingina fyri menn, altjóða dystir hjá feløgum, altjóða dystir hjá landsliðnum, bestu kvinnudeildina og steypakappingina hjá kvinnum.

Tilsamans verður mett, at talan er um væl oman fyri 10.000 seðlar, sum soleiðis skulu lesast inn. Sjálvandi við nógvum upplýsingum og hvørjum einstøkum seðli. Fyrsti parturin av ætlanini snýr seg um bestu mansdeildina, og bar her eru á leið 3.000 dómaraseðlar.

Um alt gongur heilt væl, verður miðað ímóti at heimasíðan kann gerast almenn einaferð í 2007.

## Ætlar sær farloyvi

Tað er saman við Eyðun Lamhauge og Bjarna Joensen, at Marni Mortensen er farin í holt við verkætlanina um føroyskan fótbólt og fótbóltshagtøl.

Innsavan og –tøppan av upplýsingunum stendur Marni sjálvur fyir, meðan hinir báðir er teldumenn. Eyðun, sum er krumtappurin innan forritanina, meðan Bjarni, sum er búsitandi í Danmark, higartil hevur verið eitt slag av backup, hann kemur væntandi meira upp í arbeiðið.

– Nú hava vit arbeitt við hesum eina tíð, og upp á eitt hálvt ár havi eg lagt kanska 1.000 dómaraseðlar inn. Var tað ikki tí, at eg havi fingið so góðan stuðul heimanífrá, so hevði tað als ikki borið til, men samstundis meti eg ikki, at eg áhaldandi kann bjóða familjuni tey kor, at eg mest sum hvørt tað einasta kvøld skal sita við hesum.

– Sjálvur síggi eg fyri mær, at hetta er ein spennandi ætlan, sum bæði feløg, FSF og onnur kunnu fáa gleði av, og tí havi eg vent mær til føroysku feløgini við eini umsókn um peningaligan stuðul. Endamálið við hesum er, at sjálvur kann taka mær farloyvi í kanska tríggjar mánaðir, soleiðis at eg veruliga kann koma víðari í hesum arbeiðinum, sigur Marni.

Áðrenn umsóknirnar vórðu sendar út, hevði hann verið í sambandi við fleiri feløg, og ikki minst FSF, har stórur partur av dómaraseðlunum eru.

– Higartil hava øll verið positiv, og tað er ongan tíð nakar, sum hevur nokta at hjálpt við yiskum lutum. Bæði hjá feløgunum og hjá FSF. Tí rokni eg við, at tey eisini síggja møguleikar í hesum, og tí vóni eg, at tey eisini vilja stuðla hesum við eini lítlari upphædd hvør. Nakað sum nøkur longu nú hava givið tilsøgn um, staðfestir Marni.

**-mørk**